

*Fyrsti kundin í nýggja handlinum hjá Gissur, Expert. Aftanfyri hóma vit fleiri kundar, sum standa og bíða eftir at sleppa inn*



*Stúgvandi fult av fólki var í SMS fyrrapartin, og her er tað ein barnagarðsflokkur, sum vitjar*



*SMS hevur fingið 14 nýggjar handlar og eina heila hædd aftrat*

# So læt SMS upp

Í morgun kl. 10 opnaði SMS aftur eftir drúgva og umfatandi umbygging. Ikki færri enn fjúrtan nýggir handlar eru, og teir handlarnir, sum vóru áðrenn, hava næstan allir gjørt onkra umbygging ella broyting.

Størsti handilsmiðdepilin í Føroyum er vorðin uppaftur størri, og í veruleikanum er næstan ein heil hædd komin aftrat.

Stúgvandi fult av fólki var í SMS fyrrapartin, og so hvørt fólk fáa frí frá skúla og arbeiði kann væntast, at uppaftur meir fólk fyllist í nýupplatna og prýðiliga handilsmiðdepilin.

**-rwd**


Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

TÍÐARAVMARKAÐ STARV TIL KT-VERKÆTLAN

Hagstovan hevur sett sær fyri at smíða eina nýggja hagtalsliga virkisskrá. Hon skal veita okkum dagført yvirlit yvir fyritøkur og stovnar - hvar tey halda til, hvat tey takast við, hvussu stór tey eru osfr..
Vitanin um fyritøkurnar stavar fyrst og fremst frá skipanum hjá Toll- og Skattstovuni og Skráseting Føroya.
Ætlaða telduskipanin skal vera stuðulin í arbeiðinum at vinda hagtalsligar upplýsingar burtur úr umsitingarliga upprunatilfarinum.

Okkum tørvar eitt fólk til at vera við til at snikka bygnað og dátustrukturar saman og til at forrita skipanina. Goymsluskipanin er Oracle og forritingin av brúkaramarkamóti verður at gera við Oracle Internet Developer Suite ella øðrum líknandi amboð.
Arbeiðið fer fram í samstarvi við KT deildina og hagfrøðingarnar á Hagstovuni.

Ongi serstøk krøv eru til útbúgving, men dentur verður lagdur á førleikar og royndir. Starvið er avmarkað til eitt ár og verður lønt eftir sáttmála millum avvarandi felag og Fíggjarmálaráðið.
Umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 1.novembur.
Vil tú vita meiri um starvið, so set teg í samband við Axel Nolsøe ella Berg Dam á Hagstovuni, telefon 352800.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
GLYVURSVEGUR 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO